**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0736**
**Tíðarskeið 16/05-23/05-2007**

---

**Fólk frá FRS.:** Bogi Hansen og Regin Kristiansen.
Bertrand (ein fransmaður frá AQUALAB).
**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum og at taka streymmátara upp á teimum føstu støðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at taka fortoyningar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 17/5 kl.2100. Siglt varð norður til NWNG, sum varð tikin upp, tá tað var vorðið ljóst. So var hildið fram við NWNB og víðari til NWNE og NWNA, allar komu upp uttan trupulleikar.
Vit fóru nú inn á Havnina við Bertrand, tí hann hevði trupulleikar við útgerðini, sum hann skuldi seta út. Hann avgjørdi tí, ikki at seta nakað út hendan túrin.
Av Havnini sigldu vit vesturum, og tóku skurð V, tá hann var liðugur, sigldu vit í Bankarennuna, har vit skuldu taka tveir streymmátara upp, NWFC og NWFB, teir fingu vit upp í øllum góðum.
Haðani varð siglt eystur á Munkagrunnin, har vit byrjaðu upp á skurð S, og tóku hann móti Hetlandi. Á vegnum tóku vit NWSC upp. Tá skurður S var liðugur, sigldu vit norður á skurð E og tóku hann inn móti landi.
Tá hetta var liðugt, varð siglt á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini mánadagin 21/5 kl. 1400.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 39 støðir og saltprøvar á 35. Við WP2 glúpinum tóku vit eisini 37 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða lisnir í summar.

**Viðmerkingar:**

22-05-2007 ________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0636